# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2023/2024



## SPURDÓMUR (SETIÐ HANN INN HER)

(Setið mynd av flokkinum inn her)

Granskarar: x flokkur í skúlanum ...

Robbin, Helga, Johan, Jákup Martin, Linda og Rúna

# INNGANGUR

Stutt um arbeiðið og frágreiðingina

Vit hava havt um tyggigummi hesa fer, tí at tað er ikki loyvið í okkara skúla og fóru vit at hugsa hví tað ikki var loyvið. Soleiðis funnu vit fram til okkara spurdóm.

Vit hava ringt til ymiskar skúlar fyri at hoyra teyra meining um tyggigummi í skúla tíð, vit hava eisini gjørt spurnaðarkaningar har vit hava spurt allar lærararnar og øll børnini í Kvívíkar skúla um teira meining.


Lærari:

Maria H. Matras, mm1110m8@skulin.fo

Luttakarar:

Nøvn á øllum

Helga av trøð lauritsen

Rúna av trøð lauritsen

Linda Petersen

Jákup Martin Joensen

Johan Waagstein

Robbin Samuel Ørvarodd

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD


1.Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hettar er okkara høvus spurningur: Hví hevur man ikki lov at brúka tyggi gummi í skúlanum í Kvívík?

Hetta eru okkara undanspurningar:

1. Hvussu fáa tey smak í tyggi gummi?

2. Hvat er tyggi gummi gott fyri?

3. Hvat er tyggi gummi ikki gott fyri?

4. Nær bleiv tyggi gummi upfunni?

5. Nær bleiv tyggi gummi populert?

6. Hvussu nógv sløð av tyggi gummi er til?

7. Hat er tyggigummi gjørt burtur úr?

8. Hvør uppfann tyggigummi?

Vit  ætla okkum eisini at spyrja skúlar runt í føroyum um børnini har sleppa at hava tyggi gummi í skúla tíð.

Vit fara eisini at gera spurnaðarkanningar har vit fara at spyrja øll børnini í kvívíkar skúla um tey eta tyggi gummi hvørja viku, hvat teirra yndis smakkur av tyggigummi er og um tey vilja hava loyvið at eta tyggigummi í skúlatíð.

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Hettar er okkara hypotesa til høvusspurningin: tí tað larmar, og forstyrar hini sum ikki hava tað.

Hypotesa til undanspurning 1. Tá tyggi gummi er liðugt sproyta tey smakkin í.

Hypotesa til undanspurning 2. Tað er gott fyri konsenttrationina.

Hypotesa til undanspurning 3. Náttúrina, tí tað tekur longi at niður bróta og djór sum eta tað kunnu doyggja.

Hypotesa til undanspurning 4. Vit halda at tað bleiv upfunni 1872.

Hypotesa til undanspurning 5. Vit halda at tað bleiv populert í 1963 tí tað var sikkurt giftut í byrjanini.

Hypotesa til undanspurning 6. Vit halda at tað eru 72 sløð til.

Hypotesa til undanspurning 7. Vit halda at tyggigummi er gjørt burtur úr sukur, salt, frugtfarva og smak.

Hypotesa til undanspurning 8. Vit halda at ein ríkur maður frá europa tí teyr høvdu ofta meira frítíð at gera frítíðar ítriv en arirð men.

Vit halda at flestu skúlarnar sum vit fara at ringja til fara at siga at børnini har ikki sleppa at eta tyggi gummi í skúlatíð.

Vit halda at tey flestu børnini í Kvívíkar skúla eta tyggi gummi.

Vit halda at yndis smakkurin hjá flestu børnunum fer at vera jarberð.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Hettar er okkara ætlan:

- Spurnarkaningar.

1.Hvussu nógv eta tyggi gummi hvørja viku?

2.Hvat er tann populerasti smakkurin av tyggi gummi?

Málbólk í øllum kvívíkar skúla.

- Google.

Finna út av svarinum.

- Vit ætla at ringja til ymiskar skúlar í Føroyum og spyrja um børnini har sleppa at eta tyggigummi í skúlatíð?

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR

Vit hava gjørt spurnarkaningar har vit hava spurt øll børnini í Kvívíkar skúla um tey ótu tyggigummi hvørja viku, hvat var tann populerasti smakkurin av tyggigummi og hvussu nógv vilja hava loyvi at eta tyggigummi í skúliatíð.

Vit hava eisini ringt til ymiskar skúlar. (kollafjarar skúli, skála skúli, sumba skúli, hvalba skúli, eystur skúli, løgmannabreyt skúli, argja skúla, sørvágs skúli, megin skúli, skúlin á fløtum, Hoyvíkar skúli, tvøroyar skúli, leirvíkar skúli og skúlan á trøðum)

Vit fóru á netið at leita eiftir svar á okkara spurningar.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Svar til okkara høvusspurning: tað er ikki allar skúlar sum sum hava forboð mótir tyggigummi og tí hava vit spurt nógvar ymiskar skúlar um børnini sleppa at hava tyggigummi í skúlatíð.

Vestmanna skúli segið: Nei tað sleppa tey ikki, men tey síkja seg ofta alíkavæl.

Leirvíkar skúli segði: Nei, tí tá tey eru liðug koyra tey tað uppundir borðið og stólarnar.

Skála skúli segði: Ja tí tey hava ikki hugsa um tað.

Kollafjarar skúli segði: Ja, tí tey skikka sær væl.

Eystur skúlin segði: Nei, tí tað dálkar og forstýrar.

Løgmanna breyt segði: Ja tey sleppa men vit vita ikki hví.

Hvalbiar skúli segði: Vit hava ikki ordiliga tiki støðu til tað enn.

Skúlin á Trønið segði: Tey sleppa um tey ikki forstýra ella smaska.

Skúlin á Fløtum segði: Vit hava einki ímóti at tey fáa sær tyggigummi.

Hoyvíkar skúli segði: Vit hava ongar trupuleikar við tað.

Tvøroyrar skúli segði: Ja, tað er loyvið.

Porkeris skúla segði: Nei, tí tey seta tað allað staðni tá tey eru liðug.

Kvívíkar skúli sigur: Nei, tí tað dálkar og forstýrar.

**Úrslit:**
8/13 skúlar søgdu ja til tyggigummi og 5 søgdu nei. Altso eru tað 61,538% sum siga ja

**Spurnaðarkanning 1**.

Etur tú tyggigummi hvørja viku: 38 søgdu ja og 26 søgdu nei.

**Spurnaðarkanning 2.**

Hvat er tí yndis tyggigumm smakkur?

16 børn dámdu mint best, 35 børn dámdu jarberð best, 3 børn lakres best, 4 børn dámdu nakað annað best.

**Svar til okkara undan spurningar.**

Svar til undanspurning 1. Tyggigummi fer í eina mashinu og so koyra tey spækuliga smakkin í tyggigummiði.

Svar til undanspurning 2. Tað gevur góðan anda, hjálpur tarmunum, forar fyri stress, hjálpir konsentrtiónina og hjálpir tarmarnar.

Svar til undanspurning 3. Tað er ikki gott tí tá man tyggir fær man meira vatn í munin, men man følir ikki at man fær nakað í búkin, so tað ger at man fær størri matarlist, og størri tjansur at blíva feitur.

Svar til undanspurning 4. Tyggigummi bleiv uppfunni í 1848.

Svar til undanspurning 5. Tað bleiv populert tá í annað veraldarbardagi var.

Svar til undanspurning 6. Tað eru um. 187 sløg av tyggigummi til.

Svar til undanspurning 7. Tyggigummi er gjørt burtur úr sukkur, majs siropur, jarberð, vatnmelón, bubble gum base og bubble gum flavor.

Svar til undanspurning 8. William sempel, ein tannlækni frá ohio

Svar til spurnaðarkanningar við málbólkin Kvívíkar skúli

Spurnaðarkanning 1.  38 søgdu ja og 26 søgdu nei.

Spurnaðarkanning 2. 16 børn dámdu mint best, 35 børn dámdu jarberð best, 3 børn lakres best, 4 børn dámdu nakað annað best.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit hava gjørt ein stuttfilm av tí sum vit hava gjørt og vísa øllum tað.

# FYLGISKJØL

1. filmur